## Smyril í trupulleikum leygardagin

Smyril fekk so mikið álvarsligar tekniskar trupulleikar leygarmorgunin, at tað órógvaði siglingina. Hann skuldi fara úr Havn klokkan sjey leygarmorgunin, men brek í elektrisku skipanini førdi til, at ferðin varð útsett í tveir tímar. Smyril fór sostatt úr Havnini næstan tveir tímar seinkaður, tá ið teir hildu seg hava loyst trupulleikan. Men tá ið hann hevði siglt eitt korter, fór brekið aftur at gera um seg aftur.Fyri at binda um heilan fingur, gjørdi skiparin av at venda aftur til Havnar. Har fingu teir bilbukt við brekið, so Smyril loksins slapp suður klokkan 14. Restina av degnum skuldi hann so sigla eftir ferðaætlanini. Men gakk: Tá ið hann skuldi loysa av Krambatanga klokkan 18.30, gjørdi brekið aftur vart við seg og sostatt var hann næstan tveir tímar seinkaður norður og túrurin suður aftur varð tilsvarandi seinkaður. Men tá høvdu teir fingið endaliga bilbukt við brekinum.

## Øll á Strendur at velja

Bygdaráðið á Strondum hevur nú gjørt av, at hereftir verður bara eitt valstað í kommununi og tað verður í bygdarhúsinum á Strondum. Sostatt samtykti bygdaráðið herfyri, at niðurleggja valstaðið á Selatrað. Bygdaráðið ásannar, at tíðin er farin frá at hava fleiri valstøð í kommununi. Á næsta valið, sum allarhelst verður kommunustýrisvalið tann 11. november skulu veljarar á Selatrað og Morskranesi tískil á val í bygdahúsinum á Strondum, sum í framtíðini verður einasta valstað í kommununi.



# Løgmaður stendur veikur í stríðnum um skrivstovuna



**Bjørn á Heygum, løgfrøðingur, heldur ikki, at løgmaður kundi leggja hald á skrivstovuna hjá Høgna Hoydal frá degi til dags. Hann var við at smíða stýrisskipanina og hann heldur, at løgmaður stendur á veikari grund.**

SKRIVSTOVUMÁLIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Ein spurningur er, um løgmaður er farin út um sínar heimildir. Ein heilt annar spurningur er, hvørjar heimildir, løgmaður hevur.

Tað heldur Bjørn á Heygum, løgfrøðingur, sum eisini var við til at gera stýrisskipanarlógina.

Vit hava spurt hann, hvat hann heldur um ósemjuna, sum hevur tikið seg upp ímillum løgmann og Høgna Hoydal, fyrrverandi landsstýrismann í uttanríkismálum, um tiltiknu skrivstovuna í Tinganesi, sum var fyri innbroti, fyri at brúka eina vending, sum tey á løgmansskrivstovuni sjálvi hava brúkt.

Og hann heldur, at løgmaður stendur rættiliga veikur í hesum máli.

Tað vóru tríggir løgfrøðingar, sum á sinni gjørdu stýriskipanarlógina og áður hava tveir av teimum sagt sína hugsan um tiltikna skrivstovumálið í Tinganesi, sum fekk bikarið hjá løgmanni at flóta yvir, so at hann tveitti Tjóðveldið úr samgonguni.

Anfinn V. Hansen heldur, at løgmaður fór út um sínar heimildir. Hinvegin heldur Sjúrður Rasmussen, sum eisini er løgfrøðiligur ráðgevari hjá løgmanni, at løgmaður hevur allan rættin á sínari síðu.

Av tí, at teir báðir eru grundleggjandi ósamdir, hava vit eisini spurt triðja løgfrøðingin, sum smíðaði stýriskipanina, Bjørn á Heygum, um hansara áskoðan á málið.

### Løgmaður kann ikki krevja

Bjørn á Heygum sigur, at útgangsstøðið er, at hvørt landsstýrisfólk ræður sjálvur fult og heilt ræði á sínum málsøki og eisini fulla ábyrgd av tí. Landsstýrisfólk liggja tískil ikki undir fyri nøkrum øðrum, yvirskipaðum valdi, heldur ikki løgmanni.

- Gjørdu tey tað, høvdu tey ikki fulla ábyrgd av sínum málsøki, tí so var tað tvørtur ímóti løgmaður, sum hevði evstu ábyrgdina og tá verður tað meiningsleyst at draga tey einstøku landsstýrisfólkini til svars fyri sína umsiting.

Bjørn á Heygum sigur, at tað er tankin við stýrisskipanini, at hvørt landsstýrisfólk hevur fulla ábyrgd av sínum málsøki og tey kunnu sostatt eisini dragast til svars fyri sína umsiting.

- Men tað kunnu vit bara krevja av landsstýrisfólkum, um tey sjálvi hava fulla ábyrgd og sostatt ikki liggja undir fyri einum hægri myndugleika, eitt nú løgmanni. Tað stendur fast, staðfestir Bjørn á Heygum.

Hann sigur, at sostatt hevur løgmaður heldur heimild til at geva Høgna Hoydal, ella nøkrum øðrum landsstýrisfólki, kravboð um at taka eina ávísa avgerð.

Tað er løgmaður, sum býtir málsøki út og ger av, hvørji málsøki, hvørt landsstýrisfólk hevur.

- Er løgmaður ikki nøgdur við embætisførsluna hjá einum landsstýrisfólki hevur hann trý amboð. Í fyrsta lagi kann hann geva honum átalu, í øðrum lagi kann løgmaður taka eitt málsøki frá viðkomandi landsstýrisfólki og í triðja lagi kann løgmaður siga viðkomandi landsstýrisfólk úr starvi.

Men at geva landsstýrisfólki kravboð, hevur hann ikki heimild til.

### Próvbyrðan liggur hjá løgmanni

Í sambandi við hesa tiltiknu skrivstovu, hevur løgmaður ført fram, at tað er hann, sum hevur ábyrgdina av ognunum í Tinganesi og umsitur tær.

- Er talan er um eitt landsstýrisfólk, sum húsast onkustaðni í býnum, eru væl øll samd um, at løgmaður kann ikki taka hølini frá viðkomandi landsstýrisfólki uttan víðari.

Bjørn á Heygum sigur, at vit kunnu hugsa okkum, hvat hevði hent, hevði danski íbúðarmálaráðharrin, sum hevur ábyrgd av øllum ognunum hjá danska statinum, tveitt forsætisráðharran á dyr.

Hann leggur afturat, at slíkt er fullkomiliga óhugsandi, men tað hevur hann sjálvandi heldur ikki heimild til.

- Tann brennandi spurningurin í hesum føri er, hvar heimildin hjá løgmanni at umsita ognirnar í Tinganesi, liggur.

Bjørn á Heygum sigur, at av forvitni hevur hann leitað í málsøkjabýtinum ímillum landsstýrisfólkini, men hann hevur onki funnið, sum gevur løgmanni heimild at ráða yvir ognunum í Tinganesi.

- Tað kann verða okkurt, eg ikki havi fangað, men eg havi so ikki funnið nakað, sum gevur løgmanni hesa heimild.

- Finst ongin beinleiðis áseting um, at løgmaður hevur ábyrgdina av ognunum í Tinganesi og ræður yvir teimum, haldi eg, at hann hevur ein trupulleiki.

Bjørn á Heygum, sigur, at tað nú áliggur løgmanni at prógva, at hann hevur ræðið á ognunum í Tinganesi.

- Men kann hann ikki prógva at hann hevur eina serstaka heimild at ráða yvir ognunum í Tinganesi, hevur hann ikki heimild at gera tað, hann hevur gjørt.

### Tilgjørt upprit

Sosialurin prentar tey bæði løgfrøðiligu uppritini frá Høgna Hoydal og løgmanni, aðrastaðni í blaðnum, men Bjørn á Heygum ivast ikki í, at hann hellir mest til at taka undir við Anfinni V. Hansen, sum hevur gjørt uppritið fyri Høgna Hoydal.

- Uppritið frá løgfrøðinginum hjá løgmanni tykist eitt sindur tilgjørt. Tað ber sjálvandi til at vídtulka heimildina um málsøkjabýtið. Men skal tað føra við sær, at ein landsstýrismaður kann verða tveittur úr sínum høli frá degi til dags, tí at løgmaður brádliga fær brúk fyri hølunum, virkar sum ein ógvuliga víttgangandi tulking.

- Tað er ongin greið tilskiling í málsøkjabýtinum, at løgmaður varðar av ognunum í Tinganesi og fyrrenn tað er gjørt, kann løgmaður ikki bara uttan víðari geva sær sjálvum hetta málsøki at umsita.

Men nú sigur ráðgevarin hjá løgmanni, at tað eru so nógv málsøki, at tað er vónleys at nevna øll, men at siðvenja og tulkingar geva løgmanni ognirnar í Tinganesi at umsita.

- Tað kann væl vera, men ognirnar í Tinganesi, har landsstýrið húsast, er eitt nokk so týðandi málsøki. Spurningurin er so eisini um hendan tulkingin bara snýr seg um Tinganesi ella snýr hon seg um allar ognirnar hjá landinum. Tulkingin hjá ráðgevaranum hjá løgmanni tykist nakað víttgangandi, hóast ongin kanska hevur hugsað um at áseta beinleiðis, hvør varðar av ognunum í Tinganesi.

- Skal tulkingin hjá ráðgevaranum hjá løgmanni verða galdandi, er tað ein spurningur um ikki bæði vinnumálaráðið, fíggjarmálaráðið, mentamálaráðið, tilfeingismálaráðið og almanna-og heilsumálaráðið, ikki kunnu verða tveitt á dyr frá degi til dags.